## DAGSINS MEINING

# Exit Powell

Tað gongur ikki, sum stuðlarnir hjá Bush í Europa hava vónað, nevniliga at Bush fer at leggja seg eftir einum meira hóvligum politikki. Sum kunnugt hildu nógvir eygleiðarar her í Europa og eisini her í Føroyum, at nú Bush hevði tryggjað sær valdið eitt skeið afturat, so fór hann at reka ein meira miðjusøkjandi og hóvligan politikk. Men tær tilnevningar, ið Bush higartil hevur framt, hava bent á ein enn meira konservativan og harðrendan politikk í komandi skeiði, enn rikin varð í fyrra forsetaskeiði. Fyrst tilnevndi Bush tann ill gitna dómaran Gonzales til løgmálaráðharra. Gonzales var fremsti ráðgevi hjá Bush í spurningum um at náða deyðadømdar fangar, tá Bush var guvernørur í Texas. Sum kunnugt fann eingin deyðadømdur nái, og vóru 150 fólk, her ímillum kvinnur og ósek fólk tikin av døgum í guvernørtíð Bush í Texas.

Nú átti so Powell, uttaríkisráðharri tørn. Powell skarar framúr á mangan hátt. Hann er ein av teimum fáa afroamerikanunum, ið er komin heilt upp á tindarnar í síni starvsleið. Hann var verjuovasti í fleiri ár og sostatt eisini undir Flógvakrígnum. Powell hevur verið trygdin fyri einum nøkunlunda hóvligum uttanríkispolitikki. Tað hevur leingi verið kalligt millum Powell og bólkin av ráðgevum hjá eldra Bush, ið flykkjast kring yngra Bush. Tað er alkunnugt, at Romsfeldt, verjumálaráðharri leingi hevur verið ósamdur við Powell um uttanríkispolitisku kósina. Powell var ímóti álopinum á Irak og hann hevur verið heitur talsmaður fyri, at USA skjótast skuldi koma til sættis við Europa.

Sum heild stendur Powell hóast sína hernaðarligu fortíð fyri einum uttanríkispolitikki, har politiskar loysnir verða tiknar fram um hernaðarligar loysnir. Powell stendur ómetaliga høgt í metum í USA og kring allan heimin. Men hann er viknaður nógv politiskt, meðan heykarnir kring Bush eru vorðnir sterkari. Powell hevur ikki megnað at koma á mál í Miðeystri og viðurskiftini við Europa eru verri enn nakrantíð. Hann hevur tí ásannað, at hansara hóvligi og semjusøkjandi politikkur í roynd og veru ongan møguleika hevur í næsta forsetaskeiði. Hann hevði bert verið ein kransakøkufigurur, um hann helt fram, og tað hevur hann ongan hug til. Alt bendir á, at Condolezza Rice fer at loysa Powell av. Hon er kend fyri síni harðrendu sjónarmið og hon er ein av teimum, ið hevur ráðgivið Bush út í iraksku vanlukkuna.

Fráferð Powells er ikki gott fyri umdømið hjá Bush úti í heimi. Hinvegin er lítið at ivast í, at Bush leggur lítið í hetta. Hann leggur lítið í sítt umdømi millum europæiskar statsleiðarar og friðarfólk. Hann hevur jú alt vald í USA og í Europa hevur hann Blair, sum er hin mest trúfesta sameindi av øllum. Hesa mynd hevur heimurin sæð áður. Ein amerikanskan forseta, sum leggur líka í Europa bert hann hevur Bretland við sína lið. Men sum frá líður,er hetta ikki gott fyri heimin. Tað er stórur vandi fyri, at ein enn meira harðrendur politikkur bert fer at økja um spenningin millum muslimar og vesturheimin. Í miðeystri fer USA framvegis bara at lata standa til og vápnaídnaðurin fer at fáa enn meira ávirkan á uttanríkispolitikkin. Samantikin ein framtíðarmynd við nógvum vandum og hóttanum. Tað er ikki gott fyri heimin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føroya Val fekk egið undirgravingarvirksemi aftur í gráðum kálvskinni

**Petur S. Johannessen**
*Vágur*

Ikki sørt undirritaði kann smílast, at tí, sum formaður í Sambandsflokkinum Kaj Leo nevnir ein glantrileik, nevniliga samgonguskjølini til komandi býráðssetu í Tórshavnar kommunu, tá ið eg hugsi um tann leiklut Føroya Val hevði saman við Løgmanni, Alfred Olsen og einum býráðslimi í Klaksvík o.ø., sum fekk tað avleiðing at Johan Dahl bleiv frákoyrdur sum fiskimálaráðharri av løgmanni, sum segði at avgerðin var politisk, eg meti at løgmaður ikki hevði tort at koyrt Johan Dahl frá, um Sambandstingmennirnir stóðu saman, men so var ikki, Føroya Val við Hegin Mortensen og hinum býráðslimunum vildi hava Johan Dahl frá fyri ein hvønn prís, Beata L. Samulsen segði at Johan Dahl skaddi flokkin og vildi hava hann úr flokinum, her var talan um beinleiðis álop á okkara landsstýrismann, frá lokalpolitikarum, væl stuðlaði av ávísum tingfólkunum Sambandsfloksins í suðurstreymi.

Tað er ikki so løgi at tað akkurát er Føroya Val, sum at kalla hevur spælt fallit, tí hendan sama (skitna) metoda fekk sjálvan løgmann at koyra Johan Dahl frá, og í tí sum sjálvur formaðurin í Sambandsflokkinum sigur "glantrileikinum" er bert Sjuman Hjaltalin ikki leikmaður meira, og hvat er lættast at gera, tað er at nýta kendar og effektivar metotir, sum hava víst seg at verða sera álítandi, einaferð enn, men komu hesi leikfólk sjálvi at kenna sviðjan av gjørdum gerðum hesaferð.

Hví bleiv Bjarni Djurholm ikki koyrdur frá av løgmanni orsaka av politiskum áðum, eftir at tað vísti seg at førdi alipolitikkurin hjá vinnumálastýrinum var útavlagi vánaligur, jú orsøkin er einfald, tað hevði Fólkaflokkurin ikki góðtikið, og fylgjurnar kunnu vit lætt hugsa okkum til.

So ikki kann eg annað enn smílast, hetta er sannur sambandspolitikkur tá ið hann er ringast, og tit í Føroya Val saman við Alfred Olsen og Hegin Mortensen o.ø., løgdu lunnar undir hesa eftir mínum tykki ómannsligari leiklist, men at fortíðin innheintar hesi leikfólk í tí sokallaða glantrileiki, er sjón fyri søgn.

Vónandi kann floksleiðsla Sambandsfloksins, syrgja fyri at vit í Suðuroy framyvir eisini hava rætt til at fáa landsstyrismann, serliga tá ið vit vita at hann er rætti maðurin til sessin, tað er umráðandi at hava røttu fólkini at manna landsstýrið.

# Kommunuvalið 2004

**Heri Mohr**



Úrslitið av kommunuvalinum í Havn var ikki meira enn kunngjørt, - og songartíð var hjá flest øllum atkvøðunum, - so skøddu tey 13, sum fara at mynda býráðið tann 1. januar 2005, seg í ljóðleysar sykofantskógvar, og í fríggjarakvirru fóru hesi 6 pørini og ein stakur í óunniligan paradans, sum valla er troðin áður í Føroyum. Har varð kínt, og har varð teskað, og sum vituligt er, í slíkum løtum er eingin opinleiki. Hann, tann politiski opinleikin, kemur ikki í myndina fyrr enn pørini og domptørurin fara til verka í 2005.

Hóast vit í Føroyum siga, at eitt orð er eitt orð, og ein maður er ein maður, og vit við føroyskari sjálvgleði syngja, at vit vilja ikki bróta orð, so er lítið at ivast í, at frá 1. januar 2005 fara hesi 13 at vísa somu vanvirðing fyri politiskum opinleika mótvegis teimum 10.549 atkvøðunum og borgarunum í síni heild, sum kom til sjóndar úr myrkrinum, so hvørt tað lýsti fyri degi tann 10. november.

At sleppa maktgirnd og fáfongd so fullkomiliga og aldeilis úr teymunum, sum kom til sjóndar millum býráðslimir her í Havn, er ósømiligt og sera ómentað. Vónandi fara hini bý- og bygdaráðini aðrastaðni í Føroyum ikki at elta høvuðsstaðin við slíkum siðloysi, tí, har sum ein skriða er lopin, er (sum kunnugt) onnur væntandi.

Týski rithøvundurin Hans Fallada (1893-1947) skrivaði bókina: Har man een gang spist af bliktallerkenen.

Fyri umleið 1970 árum síðani sótu 13 mans um eitt nátturðaborð, sum við svikaráðum fekk ógvusligar avleiðingar.

Fyri einum mánað síðani skrivaði Sjúrður Skaale, at Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, kundi sammetast við tann ónda vesalingin Jago í Othello hjá Shakespeare, - ein sammeting, sum tann, ið hetta skrivar, finnur ræðandi. Men tá nú hesin Jago er drigin inn á pallin sum ræðumynd í føroyskum politikki, so kundi tað verið áhugavert at vita, um Sjúrður Skaale, við støði í myrkaleikinum umrøddu nátt, dugir at ímynda sær hvørjir limir í Tórshavnar býráði anno 2005 hava samhuga við jagoismuna, sum er at javnmeta við ljótt broddahár fløkt í fínum tráði til viðkvæma búnan, vit kalla: demokrati, fólkaræði.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




VIÐMERKINGAR

# Miðnáms- og heilsuskúli og røktarheim í Suðuroynni

**Jacob Vestergaard**



Landsstýrið og samgongan hava nú kunnað kommunurnar í Suðuroynni um ætlan teirra at byggja miðnáms- og heilsuskúla í Hovi og røktarheim í Vági. Hví landsstýrið og samgongan valdi fyrst at kunnað Vágs kommunu, og harvið skapa iva og óvissu um ætlanina, veit eg ikki, men tað var betur ógjørt.

Hvar landið byggir skúlar í Suðuroynni er teirra avgerð og hevur ikki so nógv við kommunurnar í Suðuroynni at gera.

Trupuleikin í Suðuroynni er, at vit ongantíð hava tikið støðu til, ei heldur kjakast um, hvussu vit skulu skipa Suðuroynna á ymiskum økjum. Vit hava ikki greitt tey yvirskipaðu viðurskiftini í Suðuroynni, og tí ikki lagt til rættis, hvar í oynni vit skulu byggja skúlar, almennar stovnar, hava vinnuøkir o.s.fr.

Støðan er tann, at hvør hevur roynt at sæta sær sjálvum og sínum, og ikki hugsað um heildina. Skilið er hareftir. Kjakið í staðist hevur av hesi ætlan landsstýrisins, vísir greitt hvussu støðan er.

Hevði Suðuroyggin verið ein kommuna, høvdu vit sloppið undan hesum kjakinum. Tá høvdu vit, í samráð við borgararnar í oynni, havt lagt soleiðis til rættis, at vit vistu hvar í oynni skúlar, stovnar v.m. skuldu byggjast, og kundu bert víst landsstýrinum á staðið, har vit høvdu avgjørt, at byggingin skuldi fara fram.

Ætlanin við miðnámsskúlanum er nú komin væl áleiðis, og sjálvur havi eg verið ivasamur um tað er rætt at broyta ætlanina nú, havandi í huga, at aðrar stórar skúlabyggingar eru í umbúna aðrastaðir í landinum, men eg haldi at ætlanin hjá landsstýrinum er áhugaverd, og tankin um ein skúladepil er skilagóður.

Tað eru avgjørt fyrimunir við at byggja skúlarnar saman, og harvið høvdu eisini verið møguleikar fyri at flutt aðrar skúlar, t.d. útbúgvingina til heilsurøktarfrøðing, til Suðuroynna. Hvørki vágbingar ella tvøramenn missa nakað við, at skúlarnir verða bygdir í Hovi. Mest umráðandi er, at skúlarnir verða bygdir í Suðuroynni, og ikki hvar.

Verður farið undir at byggja skúlarnar næsta ár, fer tað, saman við bergholinum Hov-Øravík, at hjálpa uppá veksandi arbeiðsloysi í Suðuroynni..

Fyri undirritaða er tað líkamikið hvar í oynni bygt verður. Fjarstøðan millum bygdirnar í Suðuroynni er so lítil, at tað hevur ongan týdning hvar tú býr og hvar tú arbeiðir ella gongur í skúla.

Støðan í Suðuroynni, við 7 kommunum, talar kanska fyri, at skúlarnir verða bygdir miðskeiðis í oynni. Tað er tó sera umráðandi, at øll oyggin verður tikin við, tá um framtíðar bygging ræður, so allir borgarar í Suðuroynni verða javntstillaðir, men hesum fæst ikki greiða á, fyrrenn øll Suðuroyggin verður ein kommuna.

Ætlanin um at byggja eitt røktarheim á Vágseiði er eisini áhugaverd. Tá avgerð er tikin um at flyta miðnámsskúlan, eigur okkurt at koma ístaðin fyri, so íløgan, sum gjørd er á staðnum, ikki fer fyri onki.

Landsstýrið og samgongan áttu sjálvtsagt at lagt ein almennan stovn á Vágseiði, og harvið hildið lyftið um at flyta alment virksemið út um landið. So høvdu teir ikki havt fyri neyðini at tosa við kommunurnar í Suðuroynni. Ein almennur stovnur á Vágseiði kundi givið Suðuroynni nógv nýggj arbeiðspláss.

Hví landsstýrið og samgongan bjóðar seg til at hjálpa suðuroyingum við einum "stovni", har suðuroyingar sjálvir fyrst skulu gjalda helmingin av íløguni, og síðan, um 2-3 ár, allan raksturin, skilji eg ikki rættuliga.

Aðalreglan eigur at verða, at kommunalt samstarv, eisini á eldraøkinum, skal spretta í kommununum, og ikki verða partur av einari ætlan, sum landið hevur fostrað.

Hóast eg alla tíðina havi verið ímóti at kommunurnar hava gjørt íløgur í eldraøkið, er tað ein sannroynd, at kommunurnar, um alt landið, hava gjørt stórar íløgur í eldraøkið. Kommunurnar hava soleiðis, samstundis sum tær hava rópt um, at landið hevur lagt ov nógvar byrðar á tær, sjálvbodnar tikið byrðar á seg, sum landið eigur at bera.

Henda samanblandingin hevur gjørt, at tað er rættuliga ymiskt hvussu eldraøkið er útbygt, og eisini hvør tað er, sum hevur útbygt tað, land ella kommunur.

Tað er møguligt at tað er brúk fyri einum røktarheimi í Suðuroynni, men tað er ikki vist, at besta loysnin er at byggja dýr stovnspláss til tey eldru. Eldraøkið er er rættuliga fjøltáttað, og okkara gomlu hava tørv á nógvum ymiskum tænastum.

Tær útbyggingar, ella tey stovnspláss, sum eru framdar á eldraøkinum hava gjørt, at fleiri og fleiri almennar krónur verða brúktar á eldraøkinum, pengar, sum vit í Suðuroynni ongan lut fáa í. Fer Tórshavnar kommunu so eisini at seta ferð á útbyggingarnar av stovnsplássum til eldri, verður enn verri í Suðuroynni.

Eg vil tí heita á nýggju kommunustýrini í Suðuroynni um at taka val ímóti ætlanini viðv. røktarheiminum, hesum "serliga" tilboði frá landsstýrinum, men samstundis ansa eftir, at eldraøkið ikki verður so rakstrarkrevjandi, at kommunurnar ikki megnað uppgávuna, verður eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita.

# Viðmerking til Finnur Helmsdal

**Jákup Mørk**
*Ítróttarskrivari á Sosialinum*



Í Oyggjatíðindum seinasta mikudag hevur Finnur Helmsdal drúgva grein um fótbólt í Vágum. Herundir viðgerð hann serliga trætuna, sum íkom eftir fyrra dystin millum SÍF og MB.

Skal sum so ikki leggja meg út í, hvat Finnur heldur og skrivar, men tá talan í fleiri førum er um fullkomuliga skeivar upplýsingar, so kenni eg meg noyddan at koma við fylgjandi rættleiðingum.

### Adressan

Finnur byrjar greinina við at siga, at Sosialurin á forsíðuni tann 5. november hevur skýrt allar teir, sum spældu fyri MB í dystinum seinasta mikukvøld »skommina í føroyskum fótbólti«. Og at hetta fær tað at síggja út, sum eru fótbóltsspælarar og -leiðarar úr Miðvági millum ringastu brotsmenn. Nakað líknandi sjónarmið havi eg eisini fingið fyrilagt frá aðrari síðu, og tí skal eg fyrst og fremst gera niðanfyristandandi viðmerking.

Tað, sum greinin snúi seg um, umfataði eina og aleina ítróttarliga framferðarháttin hjá MB til dystin. Talan var soleiðis ikki um nakra niðurgering av MB ella leikarum og leiðarum tess sum heild. Men eina og aleina ein staðfesting av, at framferðin á íróttarliga økinum til júst hesa uppgávuna var undir lágmark. Hetta framgekk eisini týðuliga av samlaða forsíðutekstinum á blaðnum, eins og hetta varð staðfest í greinini.

At tað eisini vóru onnur, ið mettu hetta mál sum verandi álvarsligt brot á lógir og reglur FSF's, sæst helst eisini aftur í, at Kappingarnevndin av sínum eintingum tók málið upp. Nakað sum er rættiliga óvanligt. Og enntá endaði málsviðgerðina við at geva MB bót fyri framferðarháttin.

### Ólógligir leikarar

Til spurningin um, hvørjir leikarar vóru ólógligir til dystin, sigur Finnur Helmsdal seg hava »greiðar ábendingar um«, at Rúni Olsen og Birgir Joensen ikki høvdu loyvi at spæla við í dystinum millum SÍF og MB.

Her skal bara vísast á, at Rúni Olsen stóð á listanum, sum FSF hevði latið feløgunum yvir leikarar, sum tey kundu nýta til dystin. Birgir Joensen stóð ikki á hesum lista, men hann spældi so heldur ikki við í dystinum.

### Sektirnar úr vón og viti??

Soleiðis byrjar Finnur longsta brotið í grein síni. Her vísir hann á, at FSF als ikki hevði heimild til at gera úrskurð í málinum, soleiðis sum hann varð gjørdur.

Skal á ongan hátt stilla meg at halda nakra verjurøðu fyri FSF, men kenni meg tó noyddan at koma við fylgjandi rættleiðingum. Tí kappingarreglurnar eru sera einfaldar á hesum økinum.

Grein 39 í kappingarreglurnum staðfestir, at Kappingarnevndin bæði kann geva bót og døma felagið at missa heimavøll í ein ella fleiri dystir. Hartil stendur eisini, at nevndin kann (og ikki skal!) døma felag at tapa dyst. Tað valdi kappingarnevndin ikki at gera í hesum førinum, tí mett varð, at SÍF við hesum vildi verið revsað fyri skeivan atburð hjá øðrum parti.

Altso hevur kappingarnevndin í hesum førinum greitt handlað eftir lógarásetingunum og hildið seg innan fyri tað spælirúm, sum hesar geva.

### Halt teg til bóltin Finnur

Og so vil eg bara at enda koma við eini rættleiðing til Finnur, sum tíverri sjáldan evnar at halda seg burtur frá persónliga planinum, tá mál skulu viðgerast. Heldur enn at fara eftir bóltinum, verður farið eftir manninum - eisini hesaferð.

»...at Sosialurin rennur ørindi, m.a. fyri onkran, sum livir saman við einum av blaðmonnum teirra« kann neyvan skiljast sum annað, enn at formaðurin í SÍF verður løgd undir at standa aftan fyri greinina, sum stóð í blaðnum fríggjadagin 5. november.

Kenni sjálvur ikki nakað til motivini hjá Finni at skriva soleiðis, men kann ikki annað enn staðfesta, at eg so ikki havi runnið ørindi fyri nakran. Hvørki í Sandavági, í Miðvági ella í Havn fyri tað. Havi hinvegin roynt at lýst málið út frá teimum fakta, sum fyriliggja í hesum.

# Ein dagin mín sál var so vetrarstird, eg gekk mær mót havinum vestur....

**Arnfinnur Thomassen**

Soleiðis tekur Jákup Dahl, slóðbrótarin mikli, til í kenda Tjaldurssanginum.

Sum so mong onnur – báði fyrr og nú – var prósturin um várið 1907 farin ein túr vestur á Vágseiðið. Heilsubót fyri likam og sál ein dimman várdag...

Síðan er mangt hent – til tað betra. Gøta er komin um Vatnið, benkur eru settir soleiðis, at fólk kunnu bukka beinini, njóta natúruna.. og hvør veit, kanska ein sjáldsamur fuglur úr fjarum útlondum er millumlendur á einum kørgum oyggjarvatni.

Nú ljóðar, at skúlabyggingin á hesum natúruvakra staði skal støðgast!?

Nýbygging skal byrja í Hovi um nakrar tímar, dagar ella vikur!!!!!!????

Vælsignaðir!, tingmenn og landsstýrismenn! Vaknið!

Latið ikki ta skomm koma yvir tykkum – og okkum øll – at eitt gapandi hol í Gjógvarábøi fer at verða minnisvarðin yvir samgonguna, sum m.a. segði seg hava sum endamál at gera okkurt við neyðina og elendigheitina í Suðuroynni!

"Ì hesi sælu sparitíð" - Hava okur ráð at brúka milliónir at fylla uppí aftur eitt hol?

Latið ikki skúlamálið í Suðuroynni enda sum hjá Heðíni Brú. Tá ið Niklas Niklái kom aftur til bygdar, var hann "uppaftur lurvutari enn áður"!

Byggið fyri Guds skyld miðnámsskúlan har sum grivið er út – til okkara nýggja og fantastiska, føroyska Suðuroyar framtíðarskúla!

Vilja mentamálaráðharrin og fleiri við honum hava ein depil, so gerið hann har!

Har er ovmikið av natúruvøkrum plássi!

At fara um kommunumark má eisini galda, tá ið tað ber suðuryvir!

*Framhald á síðu 12*